FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

85 bátar landaðu góð 43 tons til gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum týsdagin. Av hesum vórðu 22 tons landað á Toftum, 16 tons vórðu landaði í Klaksvík, meðan gólvsølurnar í Vági og Sørvági tóku ímóti ávíkavist fýra og einum tonsi

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 117 | GERÐISBÁTURIN | SNELLA | 153 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 173 |
| FD 15 | ANNA MARIA | SNELLA | 269 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 259 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 408 |
| FD 216 | SIGGA | SNELLA | 46 |
| FD 229 | CAMILLA | SNELLA | 154 |
| FD 263 | RÚNI | SNELLA | 160 |
| FD 267 | SÚLAN | SNELLA | 189 |
| FD 306 | VESTURLAND M/S | GØRN | 142 |
| FD 324 | VÁTANES | SNELLA | 131 |
| FD 340 | LØKUR | SNELLA | 230 |
| FD 348 | SKORATINDUR | SNELLA | 407 |
| FD 375 | SÍLIÐ M/B | SNELLA | 105 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 1.268 |
| FD 428 | MARGIT J | LÍNA | 157 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 295 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 98 |
| FD 50 | HAVBÚGVIN | SNELLA | 90 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 2.928 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 3.596 |
| FD 612 | KNØRRUR | SNELLA | 217 |
| FD 616 | RANDI | BOTNTROL | 309 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 607 |
| FD 660 | FALKURIN | SNELLA | 734 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | SNELLA | 251 |
| FD 750 | BRIMNES | SNELLA | 293 |
| FD 753 | MARIA | SNELLA | 138 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 510 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 111 |
| FD 784 | VÓNIN | SNELLA | 138 |
| FD 884 | ÁLKAN | SNELLA | 55 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 619 |
| FD 981 | MÁSIN | SNELLA | 39 |
| FD1044 | MARIA | SNELLA | 67 |
| FD1046 | MIÐHAMAR | SNELLA | 247 |
| FD1054 | ALDUBÁRAN | SNELLA | 102 |
| FD1061 | TRAÐARBÁTURIN | SNELLA | 53 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 285 |
| FD1116 | FRIDA | SNELLA | 445 |
| FD1119 | FJALLLAMBIÐ | SNELLA | 156 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 139 |
| FD1142 | DURITA | SNELLA | 288 |
| KG 123 | HÁENNI | LÍNA | 2.816 |
| KG 21 | KYRRASUND | SNELLA | 357 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 3.062 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 358 |
| KG 452 | BEINISSVØRÐ | SNELLA | 38 |
| KG 464 | HAVNATINDUR | SNELLA | 556 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 1.675 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 2.229 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 1.402 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 1.258 |
| KG 778 | VARÐIN | BOTNTROL | 95 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 1.471 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 54 |
| TG 177 | CONNI | SNELLA | 238 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 340 |
| TG 330 | VÍKINGUR | SNELLA | 559 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 183 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 191 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 307 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 1.290 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 347 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 736 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 277 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 306 |
| TN 329 | NEPTUN | SNELLA | 77 |
| TN 422 | NÓN | SNELLA | 67 |
| TN 805 | ANNA | SNELLA | 159 |
| TN 897 | MAJ-N | SNELLA | 90 |
| TN 91 | LÓMUR | SNELLA | 158 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 448 |
| VA 303 | FØSTUVARÐI | PARTROL | 841 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 601 |
| VA 350 | SIRIÐ | SNELLA | 133 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 151 |
| VN 125 | ÆGIR | SNELLA | 201 |
| VN 255 | ELSA M/B | SNELLA | 294 |
| VN 360 | VESTMENNINGUR | PARTROL | 893 |
| VN 390 | FRAM | PARTROL | 820 |
| VN 430 | RUÐITANGI | SNELLA | 466 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 283 |
| VN 505 | RÓGVI M/B | SNELLA | 122 |
| VN 811 | HELGI | SNELLA | 244 |

| Vorunavn | kilo |
|---|---|
| TOSKUR 3 | 15.466 |
| TOSKUR 4 | 9.537 |
| TOSKUR 5 | 2.121 |
| UPSI 0 | 118 |
| LONGA 0 | 303 |
| TOSKUR 2 | 7.687 |
| TOSKAROGN | 739 |
| TOSKUR 1 | 1.294 |
| UPSI 4&5 | 136 |
| HÝSA 5 | 50 |
| UPSI 5 | 3 |
| BROSMA 0 | 20 |
| STEINBÍTUR | 54 |
| SKRUBBA | 11 |
| HÝSA 3 | 1.261 |
| HÝSA 4 | 105 |
| HÝSA 0 | 70 |
| HVÍTINGUR 0 | 9 |
| KONGAFISKUR 0 | 37 |
| HÝSA 1 | 764 |
| HÝSA 2 | 1.978 |
| UPSI 4 | 75 |
| HAVTASKA 0 | 86 |
| REYÐSPRØKA 0 | 852 |
| BROSMA 3&4 | 62 |
| LONGA 4&5 | 84 |
| KALVI 4 | 23 |
| UPSI 2 | 58 |
| LONGA 1 | 26 |
| LONGA 3 | 29 |
| KALVI 2 | 23 |
| TUNGA 0 | 6 |
| UPSI 3 | 12 |
| BROSMA 3 | 59 |
| KALVI 1 | 75 |
| KALVI 3 | 8 |
| SKØTA | 7 |
| ANNAÐ | 6 |

# Brouix í landsrættinun

Franski garnabáturin »Bruix« sum í mars mánað í fjør varð tikin í føroyskum sjógvi fyri ólógliga veiðu verður nú viðgjørdur í Eystara landsrætti, sum er saman í Føroyum.

»Bruix« var tikin suður móti markinum á 61,21 og 13,15 har hann hevði sett gørn. Báturin var so ólógligur sum hann kundi vera, tí hann hevði snøgt sagt einki fiskiloyvi.

Reiðaríið kærdi dómin inn fyri Eystara Landsrætt og nú verður so støða tikin. Umboð fyri reiðaríið eru í Føroyum.

# Fullberg góðan fiskiskap

Rækjutrolarin Fullberg hjá JKF Trol og øðrum hevur góðan fiskiskap í Eysturgrønlandi. Fullberg er einasti føroyski trolarin í Eysturgrønlandi í løtuni og teir rokna við at hava fiskað kvotuna upp tá hendan vikan er úti.

Fullberg hevur royndt í góðar 14 dagar og hevur umleið 90 tons inni. Í Eysturgrønlandi eru eisini nakrir norskir rækjutrolarar.

# Sundaberg 700 tons

Sundaberg roynir í løtuni á Røstbankanum við Lofoten, teir hava 700 tons inni og fara at royna nakað afturat. Fiskiskapurin er hampuligur, teir hava fingið eini 10 tons um dagin seinastu dagarnar. Sundaberg fór avstað beint fyri nýggjár. Trolarin eigur dupulta kvotu og hevur tí munandi rúmari fiskiræsur enn eitt nú Vesturvón og Enniberg í Barentshavinum. Hetta kemst av at Sundaberg eisini hevur kvotuna hjá Skálaberg, sum er leigaður til Grønlands.

# Sjúrðarberg 250 tons

Rækjutrolarin Sjúrðarberg úr Klaksvík roynir í løtuni á Flemmish Cap. Teir hava 250 tons inni og hava roynt í ein góðan mána. Fiskiskapurin hevur verið brúkiligur og tað hevur eisini viðrað væl, hugsa vit um árstíðina.







# Miðbýurin ynskir øllum einar gleðiligar páskir

